# Norskir sjómenn eru ov dýrir og skulu tí í land

**Norska frálandareiðaríið Siem Offshore ætlar at manna síni skip við útlendingum, tí teir eru bíligari at hava umborð enn teir norsku sjómenninir**

FRÁLANDAVINNA

*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Oljufeløgini hava kravt, at frálandareiðarí og onnur feløg, sum veita oljuvinnuni tænastur, skulu lækka prísirnar. Eitt av feløgunum, sum hevur fingið kravið, og sum ætlar sær at taka tað í álvara, er norska frálandareiðaríið Siem Offshore.

-Vit eru farin undir eina tilgongd, sum hevur til endamáls at skerja útreiðslurnar, og sum eisini skal gera okkum kappingarførari á altjóða marknaðinum, sigur forstjórin í Siem Offshore, Terje Sørensen, við Aftenbladet.

Siem Offshore, sum hevur høvuðsskrivstovu í Kristiansand, er stórari menning og hevur stórar útbyggingarætlanir fyri framman. Nógvir av teimum, sum manna skipini hjá felagnum, eru av norðvesturlandinum í Noregi, men nú hevur felagið biðið manningarnar og teirra fakfeløg um samráðingar um, hvussu rakstrarútreiðslurnar kunnu skerjast.

- Vit leggja stóran dent á at fáa eina reiðiliga tilgongd, sigur Terje Sørensen.

Í fyrsta umfari snýr tað seg um at fáa teir norsku sjómenninar av teimum skipunum, sum sigla við longum sáttmálum aðrastaðni enn á norska økinum, og at fáa útlendingar umborð á tey skipini ístaðin fyri.



*Modellmynd av sjey frálandaskipum, sum Siem Offshore ætlar at byggja*
*Mynd: Siem Offshore*

### Dýr at skifta fólk

-Tað er neyðugt at finna ein alternativan hátt at manna skipini uppá og at broyta mannagongdina við, hvussu leingi menn skulu vera umborð, og hvussu leingi teir skulu vera í landi, sigur Terje Sørensen. Hann vísir á, at tað kostar reiðarínum nógvar pengar at senda menn í øll heimsins heraðshorn fjórðu ella fimmtu hvørja viku, tí menn skulu heim at halda frí. Hann dugir ikki at siga, hvussu mangir norskir sjómenn mugu í land, ella um menn verða uppsagdir.

- Eina tíð fara vit at hava menn til avlops, men vit hava eina umfatandi ætlan um nýggj skip, so vit fara at hava tørv á fleiri manningum í komandi árum, sigur Terje Sørensen og leggur dent á, at norskir sjómenn verða framhaldandi ein týðandi partur av manningum felagsins.

-Spurdur, um frálandareiðaríini ikki áttu at havt norskar manningar, nú reiðaríini kortini vinna væl av pengum, svarar forstjórin í Siem Offshore, at hjá fleiri skipaløgum er inntøkan minkað millum 20 og 30 prosent eftir rættiliga stuttari tíð. Tá so er, hava reiðaríini ikki annað í at velja enn at laga útreiðslurnar eftir teimum minkandi inntøkunum, og her noyðast allir partar at bera sín part av byrðuni, sigur Terje Sørensen við Aftenbladet.

# Løgmaður á almenna vitja í Álandi

Viveka Eriksson, lantråd, hevur boðið Kaj Leo Johannesen, løgmanni, á almenna vitjan í sambandi við oyggjaleikirnar, sum eru í Álandi í hesum døgum.

Fríggjadagin 3. juli vitjar løgmaður í Självstyrelsegården, har álendska stjórnin og løgtingið húsast.

Løgmaður fer at hitta Viveku Eriksson og álendsku stjórnina. Á fundinum fara tey at umrøða m. a. viðurskiftini millum Áland og ES, álendska fyrivarnið innan skattalóggávu og veðurlags- og umhvørvismál. Harumframt fara partarnir at umrøða leiklutin hjá sjálvstýrandi londunum í norðurlendska samstarvinum.

Seinni á degnum verður vitjað á skansanum Bomarsund og slottinum Kastelholm og hugt verður eftir finaluni í flogbólti hjá monnum.





## > Samskip søkir eftir formanni til frystigoymsluna í Kollafirði

**Starvslýsing:**
Sum formaður fært tú høvuðsábyrgd av øllum tí dagliga arbeiðinum á goymsluni. Tú kemur eisini at hava ábyrgd av, at skrásett verður í goymsluskipanini á fullgóðan hátt. Formaðurin syrgir í hesum sambandi eisini fyri, at mannagongdirnar framhaldandi vera mentar í HACCP, góðskuskipanini, til tess at tryggja, at heilsufrøðilig krøv og kundans ynskir verða gingin á møti.

**Starvskrøv:**
Vit vænta, at tú ert fyrikomandi, hevur góð samstarvs- og samskipanarevnir og dugir at samskifta við umhugsni – eisini tá ið harðast leikar á. Eisini vænta vit viðkomandi telduførleika og royndir.

**Seinasta freist** at søkja er 03. juli kl. 16.00.

Starvið verður at seta skjótast gjørligt.

**Vit bjóða:**
- Eitt spennandi og avbjóðandi starv í einum dynamiskum kappingarumhvørvi
- Eitt óformelt og virkið arbeiðsumhvørvi
- Góðar starvsfelagar og góðar arbeiðsumstøður

**Meira kunning:**
Hevur tú spurningar til starvið, ring vinarliga til Niels Madsen, deildarleiðara hjá Samskipum í Kollafirði, á tlf. 47 77 77 ella skriva til t-post niels.madsen@samskip.com

Løn sambært avtalu.

**Umsókn skal sendast til:**
Samskip P/F
Bryggjan
FO-410 Kollafjørður

ENNEMM / SÍA / NM38335

**> Fyrirtøkan**
Samskip er ein altjóða flutningsfyritøka. Fyritøkan er ein tann størsta bingjuflutningsfyritøkan í Europa og bjóðar millum annað flutning av vøru til og úr Føroyum. Í Samskip samtakinum arbeiða uml. 1.400 fólk í fleiri enn 20 londum. Samskip byrjaði í Føroyum í 2004 og er í dag ein av leiðandi feløgunum innan flutning til og úr Føroyum. Virksemið hjá Samskip verður samskipað í Kollafirði og Tórshavn. Frystigoymslan hjá Samskip í Kollafirði rúmar 7.000 tonsum. Skipini Helgafell og Arnarfell eru skrásett í FAS skipanini. Tvey skip, á 900 TEUs hvørt, og eitt skip, 1.100 TEUs eru í fastari linjusigling til og úr Føroyum.